


*Trolini hjá Vónini skulu út á heimshøvini*

# Nú skal Vónin út í verðina

**Partafelaagið Vónin err vorðið partur av móðurfelagnum VON, sum føroyingar eiga saman við norðmonnum. Meirilutin av partapeninginum er føroyskur**

VINNAN
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Seinasta fríggjadag skrivaðu umboð fyri partafelagið Vónina og umboð fyri norska felagið Refa Frøystad Group A/S undir ein sáttmála um at leggja tey bæði feløgini undir eina móðurfyritøku ella holdingfelag, sum fær navnið VON. Tey bæði feløgini, P/f Vónin og Refa Frøystad Group A/S, ið eisini er kent sum RFG AS, halda kortini fram sum sjálvstøðug feløg undir nøvnunum P/f Vónin og RFG AS.

Eftir føroyskum viðurskiftum er talan um eina av teimum heilt stóru vinnuligu samanleggingunum. Samhært roknskapunum fyri 2007 hava feløgini 350 milliónir krónur í umsetningi tilsamans, og eginpeningurin í nýggja móðurfelagnum er 114,4 milliónir krónur.

Í sambandi við samanleggingina er eigaraskarin víðkaður. Umframt tey, sum nú eiga ávikavist P/f Vónina og RFG AS, er P/f TF Holding vorðið ein av eigarunum. Ognarviðurskiftini í móðurfelagnum eru, at P/f Kerið eigur 38%, A/S Havila (Per Sævik) 23%, P/F TF Holding 22% og Frøystad familjan eigur tilsamans 17%. Í nevndini í VON eru Klaus Rasmussen, Olaf Olsen og Jón Rasmussen, úr Føroyum, Per Sævik úr Noregi og Íslandi Fríðrik Jóhannsson úr Ísdlandi. Klaus Rasmussen er nevndarformaður, og Hjalmar Petersen frá P/f Vónini er valdur til konsernstjóra.

## Styrkja felagið úti í heimi

Pf. Vónin, sum varð stovnað í 1969, hevur í mong ár havt eina altjóða strategi, sum partvís hevur ført til stóra sølu til útlond, og eisini til at hava deildir í Kanada og Grønlandi. Refa Frøystad Group A/S hevur deildir í ymsastaðni í Noregi og hevur eins og P/f Vónin arbeitt við at styrkja handilin við útlond.

Á Vónini halda tey, at RFG er eitt gott felag at arbeiða saman við um at økja og menna virksemið.

-Við at leggja fyrtøkurnar saman kemur konsernin at hava ein stóran leiklut á norðuratlantiska marknaðinum. Bæði feløgini eru millum tey leiðandi á sínum øki, táið talan er um at útvega útgerð til fiskivinnuna og alivinnuna, og tilsamans vilja feløgini økja um sín førleika, sigur leiðslan í tíðindaskrivi. Lagt verður afturat, at samanleggingin er eitt stórt fet framá í altjóðaagerðini hjá feløgunum, og ætlanin er eisini at styrkja og økja um virksemið á altjóða pallinum.